# Blákrossheimið

# Ársfrágreiðing 2005

Tórshavn tann 15. februar 2006

# Ársfrágreiðing 2005

Blákrossheimið er stovnsett av Bláa Krossi Føroya í 1984, og vóru tá pláss fyri 5 búfólkum. Tilboðið varð víðkað til 15 búpláss 1987 og hevur Føroya Landsstýri stuðlað rakstrinum øll árini. Frá og við 2003 er hetta broytt til at Landsstýrið letur rakstrarjáttan til Blákrossheimið.

**Nevndin**
Í nevndini fyri Blákrossheimið sita trý umboð. Jaspur Langgaard av Nesi, aðalskrivari í Bláa Krossi Føroya er formaður, Per Jacobsen, bankamaður, Tórshavn er næstformaður og Sólrun Poulsen, skrivstovukvinna, Tórshavn er skrivari.

**Játtan**
Á fíggjarlógini fyri 2005 fekk Blákrossheimið eina rakstrarjáttan á kr. 4.707 mió. Játtanin helt, men tað var ógvuliga torført at fáa raksturin at hanga saman.

**Rakstur**
Raksturin verður tyngri og tyng, vegna tað at lønirnar hækka ár undan ári, og av tí at játtanin ikki hækkar samsvarandi, er torført at fáa endarnar at røkka saman, sum sæst av útrokningunum.

| | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Lønir: (í %)** | 66% | 67% | 68% | 71% | 71,2% |
| **Aðr. útr: (í %)** | 34% | 33% | 32% | 29% | 28,8% |

**Avrúsan og viðgerð**

Blákrossheimið hevur tvær høvuðsuppgávur. Onnur er avrúsan og hin er viðgerð av rúsmisnýtarum. Umframt hetta hevur Blákrossheimið sum liður í viðgerðin, tilboð um ambulanta viðgerð, familjuviðgerð og eftirviðgerð. Ynskiligt hevði í hesum smb. verið at býtt hagtølini sundur, soleiðis at avrúsan er fyri seg og viðgerð fyri seg. Hetta vilja vit arbeiða víðari við komandi ár.

**Viðgerð - býtt eftir slagi**

Hyggja vit fyrst, hvat slag av misnýtslu fólk vóru inni fyri á Blákrossheiminum í fjør, vísir tað seg, at rúsdrekka framvegis er nógv tann størsti trupulleikin. Bert tveir persónar vóru inni í fjør, ið ikki høvdu trupulleikar av rúsdrekka. Øll onnur høvdu annaðhvørt bara rúsdrekkatrupulleikar (umleið tað saman sum í 2004) ella rúsdrekka blandað saman við øðrum. Í tølum vísir tað seg, at tað e u fleiri, ið nýta tablettir at rúsa seg við og at eisini eru fleiri, ið nýta sterk stoffir. Enn vísa hagtølini ikki nakra markanta broyting viðv. hashmisnýtslu millum ung, sum fleiri ferðir hevur verið ført fram seinastu tíðina, men trupulleikin er kortini har og skal avgjørt takast í álvara. Ein orsøk til at næstan eingin "bara" nýtir t.d. hash í Føroyum er helst tann, at tilgongdin av hesum rúsevni ikki er jøvn. Talan er helst um eitt serføroyskt fyribrigdi, ið stendst av væntandi rávørutilgongd á rúsevnisøkinum.




**Viðgerð - býtt eftir kyni**

Tá talan er um viðgerð fyri rúsmisnýtslu er javnstøða ikki galdandi á Blákrossheiminum, heldur er gongdin hin øvugta! Í 2005 taldu mennirnir heili 85% av samlaðu inn-eggingunum, meðan kvinnurnar einans taldu 15%. Talan er um eina minking av kvinnuligum brúkarum svarandi til 5%. Tað er ikki so einfalt at siga júst hví gongdin er soleiðis, men tað er helst trupult hjá kvinnum at koma í viðgerð vegna kvinnu- og mammurollina, ið føroyskar kvinnur altíð hava havt. Eisini eru fleiri, ið helst aftra seg við at koma inn, tí tær ikki tora so væl at tosa um sínar kenslur saman við einum fleirtali av monnum. Tørvurin á at hjálpa kvinnuligum rúsmisnýtarum er helst størri enn tølini vísa, og tí hevði verið ynskiligt at býtt viðgerðina sundur, soleiðis at menn vóru fyri seg og kvinnur fyri seg. Men hetta merkir eisini, at neyðugt er at seta meiri pening av til hetta øki.




## Viðgerð - býtt eftir aldri

Tølini fyri aldursbýtið vísa, at nógv tey flestu, ið gera nýstlu av viðgerðartilboðnum á Blá-krossheiminum eru tey millum 30-60 ár. Hesi telja í alt uml. 78%, ið er nakað tað sama sum fyri undanfarna ár. Miðalaldrinum á fólki, ið lógu inni er hækkaður frá 44 árum í 2004 uppí 46 ár í fjør. Í 2005 vóru 17 fólk yngri enn 30 ár inni. Tey ungu nýta í størri mun sterkaru rúsevnini sum t.d. hash, amfetamin, kokain, narkotisk evni o.l. saman við rúsdrekka. Hetta ger, at tað aloftast er truplari at fáast við og tekur longri tíð at viðgerða. Tey ungu kenna seg rímuliga væl á Blákrossheiminum, men tað kann tó verða trupult hjá teimum at vera saman við "gomlum" rúsdrekkamisnýtarum. Ynskiligt hevði tí eisini verið, um eitt serstakt viðgerðartilboð var fyri ung. Umráðandi er eisini, at tey ungu koma í viðgerð skjótast gjørligt, áðrenn trupulleikin verður ov stórur og veruliga fær fastatøkur á teimum. Besta loysnin er kortini at gera meira við upplýsing og fyribyrging millum børn og ung. Lættari er at fyribyrgja enn at hjálpa.




**Viðgerð - býtt eftir hvussu ofta fólk hava verið inni**

Í alt vórðu skrásettar 220 innleggingar í fjør og er hetta nakað tað sama sum í 2004, tá 219 innleggingar vórðu skrásettar. Í hesum smb. vóru eisini uml. 5% fleiri seingjarpláss skrásett í ár í mun til í fjør (4117 í 2005 mótvegis 3919 í 2004). Miðaltalið fyri, hvussu nógv fólk vóru inni pr. dag í fjør, var 12,5 fólk. Fyrra helvt av árinum var heldur slakari enn seinra, tá fólk hinvegin mangan stóðu á bíðilista fyri at sleppa inn. Pláss er fyri 15 búfólkum á Blákrossheiminum í senn, 5 í avrúsingini og 10 í sjálvari viðgerðini.

Tølini fyri undanfarna ár vísa eisini, at rættuliga fáir persónar koma afturvendandi í viðgerð. Heili 71% av teimum, ið vóru í viðgerð í fjør, vóru bert inni ta einu ferðina. Í 2005 var hetta talið 70% og vóru 19% inni tvær ferðir.

5% vóru inni tríggjar ferðir og so eru tað tey afturvendandi, ið telja 9 fólk ella 6%, ið vóru inni 4 ferðir ella oftari. Í hesum smb. kann viðmerkjast, at talan ikki er um nakra veruliga viðgerð, heldur er talan um avrúsing í nakrar dagar. Gongdin seinru árini hevur verið, at nógv fleiri ymisk fólk hava verið inni í viðgerð, t.d. vóru 143 ymisk fólk inni í fjør, harav 70 (í mun til 66 árið fyri) ongantíð høvdu verið í viðgerð áður. Alsamt fleiri, ið koma í viðgerð á Blákrossheiminum, steðga longri og harvið fæst eitt betri viðgerðarúrslit.




**<u>Ambulant viðgerð</u>**

Blákrossheimið hevur sum liður í viðgerðini tilboð um ambulanta viðgerð og eftirviðgerð á ymiskum økjum. Hetta virksemið er kortini skert nakað, vegna øðrvísi raðfestingar, har døgnviðgerðin á sjálvum stovninum er raðfest fremri. Ókeypis ambulantu tilboðini krevja rættuliga stóra orku og pening, og tá arbeiðsorkan seinastu árini hevur verið minkandi saman við eini skerdari játtan, hevur ikki verið gjørligt at gjørt so nógv sum ynskiligt á hesum øki. Kortini vóru eisini nógvar samrøður við einstaklingar og familjur v.m. í fjør. Ynskiligt hevði verið at sett meiri arbeiðsorku og tíð av til hetta økið, tí vit síggja ein avgjørdan tørv á hesum. Men eisini á hesum øki er neyðugt at peningur fylgir við.

| | 2003 | | 2004 | | 2005 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Viðtalur pr. ár | Tímar pr. ár | Viðtalur pr. ár | Tímar pr. ár | Viðtalur pr. ár | Tímar pr. ár |
| Staksamrøður | 504 | 504 | 426 | 426 | 440 | 440 |
| Eftirviðgerð | 63 | 341 | 65 | 357,5 | 64 | 352 |
| Familjuviðgerð | 138 | 138 | 102 | 102 | 114 | 114 |
| Eftirviðg. bólkur | 364 | 52 | 340 | 52 | 208 | 52 |
| Antabus viðgerð | 276 | 138 | 350 | 175 | 261 | 130,5 |
| Búfelagsskapur | Búfólk pr. mða. 5,4 | | Búfólk pr. mðr. 6,5 | | Búfólk pr.mðr. 4,5 | |

**Ymisk hagtøl frá Blákrossheiminum**

| | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|
| Tal av innleggingum: | 235 | 219 | 220 |
| Seingjarpláss í alt: | 4019 | 3919 | 4117 |
| Miðal búfólk pr. dag: | 13 | 12 | 12,5 |
| Ymisk fólk í viðgerð: | 115 | 150 | 143 |
| Nýggj folk í viðgerð | 37 | 66 | 70 |
| Menn: | 79% | 84% | 85% |
| Kvinnur: | 21% | 16% | 15% |
| Miðalaldur: | 47 ár | 44 ár | 46 ár |

**Framtíðarútlit**

Viðmerkjast kann, at vit í longri tíð hava havt eitt ynski um at flyta viðgerðina á Blákrossheiminum úr Havnini m.a. fyri at fáa eitt betri viðgerðarúrslit í góðum, tryggum umhvørvi, og har vandin fyri at falla í freisting er minni. Sum málið sær út í løtuni liggur fyrispurningur hjá Yvirfriðingarnevndini um grundøki í Nes haga, og vænta vit at fáa svar uppá hetta í 2006.

Vinarliga og við vón um framhaldandi gott samstarv.

Olga Magnussen, leiðari